## Kvikur ráðharri

Norski løgmálaráðharrin, Knut Storberget, bjargaði í gjár einum tvey ára gomlum enskum smádrongi, sum mundi drukna í einum svimjihyli í spanska frítíðarbýnum Torrevieja. Knut Storberget var saman við synum sínum við svimjihylin, tá hann brádliga fekk eyga á ein smádrong, sum fór til botns í hylinum. Hann leyp útí og fekk drongin upp á turt. Drongurin gav einki lívstekin frá sær, men Knut Storberget fekk lív í hann aftur.

## GPS á roysning

Fyri einum mánað síðani settu vísindafólk GPS-sendarar á átta roysningar í Vesturgrønlandi, men sambært BBC eru sjey teirra givnir at geva tekin frá sær. Vísindafólkini kunnu tí ikki annað enn vóna, at tann áttandi roysningurin kann siga teimum tað, sum tey vilja hava at vita. Ætlanin er at kanna, hvar teir vesturgrønlendsku roysningarnir halda til um summarið. Tann, sum framvegis sendir, er ongan veg farin enn.

# gar bjóða til bátastevnu í morgin



Okkurt árið hevur bátatalið táttað í 200, men í fjør var veðrið heldur ólagaligt, og tá lá var samlaða bátatalið eini 70-80.

- Vit vænta hópin av bátum hesaferð, sigur forkvinnan í VÍF.

### Ikki bygdastevna

Jóngerð vísir á, at tey royna at skipa so fyri, at bátastevnan í Vestmanna ikki verður ein bygdastevna, soleiðis sum vit kenna hesar stevnurnar aðrastaðni.

- Vit vilja varðveita stevnuna sum eina bátastevnu, har dentur verður lagdur á bátarnar og manningarnar, sum eru við bátunum.

Hon vísir á, at stór skrá er løgd fyri stevnuna, sum sjálvandi hevur eitt sindur av hvørjum at bjóða.

- Tað er sera hugnaligt á bryggjuni, meðan stevnan er. Fólk ganga ímillum bátarnar; tey matgera og hugna sær saman. Harmonikutónar og sangur eru at hoyra, tá kvøldið kemur.

### Góðar umstøður

Jóngerð vísir á, at VÍF hevur lagt bátabrúgvar út, soleiðis at umstøðurnar hjá bátunum kunnu vera so góðar sum gjørligt.

- Vit selja trygdarnet, sum skulu hangast ímillum bátarnar, og vit útvega øllum bátunum landstreym. Vaktir syrgja eisini fyri, at fólk, sum eru umborð á bátunum og ferðast tvørtur við bryggjukantinum, kunnu vera trygg, meðan stevnan er.

Hon sigur, at tá ið bátarnir hava lagt til bryggju í Vestmanna í morgin, verða teir tilmeldaðir og tað næsta, sum hendir, er, at bátsmanningarnar fáa suppu at eta.

- Síðan byrjar stevnan og hugnin, sum er rundan um stevnuna, ið nú rættiliga hevur fest røtur í Vestmanna, sigur Jóngerð Nielsen.

# Stór vísindalig ráðstevna um heilsu

**Sunnudagin byrjar ein fimm-daga long vísindalig ráðstevna í Norðurlandahúsinum við 200 luttakarum; teir flestu uttanlands. Evnið er, hvussu umhvørvið í móðurlívi ávirkar heilsuna seinni í lívinum**

GRANSKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri fýra árum síðani spurdi redaktiónsleiðslan og nevndin aftanfyri vísindatíðarritið »Journal of Basic & Clinical Pharmacology & Toxicology« Pál Weihe, yvirlækna og granskara, um føroyingar vildu átaka sær at skipa fyri eini ráðstevnu um heilivág og eitringarlæru.

Farið varð í gongd at fyrireika eitt viðkomandi evni, og Pál Weihe og hansara fólk komu skjótt fram til, at hetta skuldu hava nakað við heilsu og ávirkanina frá umhvørvinum at gera áðrenn føðingina.

Pál Weihe sigur, at tað hevur eydnast at fáa nógvar kendar granskarar at koma til ráðstevnuna. Hesir fara at greiða frá egnum granskingarúrslitium, men fáa samstundis høvi at kjakast við starvsfelagar um granskingarúrslit.

Heili 200 luttakarar koma til ráðstevnuna, har av teir flestu koma úr londum uttanfyri Skandinavia.

- Sjálvt um arvurin er tann sami, kunnu ymisk umhvørvi í móðurlívi hava við sær varandi broytingar í heilsustøðuni. Dømi um hetta eru dálkandi evni, men hinvegin eru eisini evni, sum kunnu virka gagnlig, sum til dømis fitisýrur. Umráðið er ógvuliga víðfevnt og hevur stóran og vaksandi áhuga millum granskarar, sigur Pál Weihe.

Upp á spurningin um hvat kemur burtur úr slíkari ráðstevnu, sigur Pál Weihe, at tað verður útgivið eitt sertíðarrit við teimum týdningarmiklastu fyrilestrunum. Harafturat er ætlanin at gera eina samtykt við tilráðingum á økinum.

Ráðstevnan er fíggjað við luttøkugjaldi og stuðli frá tíðarritinum, Journal of Basic & Clinical Pharmacology & Toxicology, amerikanskum myndugleikum, ES, heimsheilsustovninum WHO, Almanna- og heilsumálaráðnum og Tórshavnar Býráð.

Vísindaliga ráðstevnan byrjar sunnudagin klokkan 16, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður, setir ráðstevnuna klokkan 17.30.



*Pál Weihe, yvirlækni og granskari, er ein av fyriskiparunum av altjóða vísindaligari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum*